# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Meðan vit bíða eftir pakkanum

Í gjár umrøddu vit her skilagóðu politisku fráboðanina frá leiðsluni í Tórshavnar býráð um støðu býráðsins til búskapar- og fíggjarkeppuna, sum er farin at gera um seg eisini her í Føroyum. Vit vístu á, at fráboðanin signalerar eina offensiva strategi, har ein fer at leggja seg eftir vøkstri heldur enn niðurlaging av kommunala geiranum í høvuðsstaðnum. Vit fegnaðust um tann hugburð, sum býráðsins fráboðan umboðar. Talan er um ein hugburð, sum stuðlar upp undir bjartskygni og vón hjá borgarum og vinnu heldur enn at elva dapurskygni og vónloysi. Í sama viðfeingi sóknaðust vit eftir tí vaktstrar- og kreppupakka, sum nú leingi hevur verið ávegis úr landsstýrinum.

Vit gjørdu viðmerkingar til tað, sum higartil hevur likið út um innihaldið í pakkanum og vístu á, at almennu og kommunalu geirarnir draga ikki eina línu. Hetta kann gerast óheppið. Spyrjast má, um landsstýrið og kommunurnar als ikki tosa saman um tann vakstrarfremjandi og kreppufyribyrgjandi politikk, sum neyðugt verður at reka komandi árini. Her má samskipan og dialogur til.

Í sambandi við at sóknast verður eftir almenna pakkanum, skal verða ásannað, at tað sjálvsagt ikki er nakar lættur setningur at evna til eina ætlan, sum skal lúka tey krøv, almenningurin setur til eina slíkan vakstrar- og kreppupakka. Havnar kommuna hevur tað í so máta lættari, og politiska støði undir leiðsluni í Tórshavnar býráð er ivaleyst væl sterkari enn politiska støðið hjá løgmanni og fíggjarmálaráðharra. Hesir báðir hava sjálvsagt at gera við nógv mótstríðandi áhugamál. Vinnurnar vilja eitt, fakfeløgini eitt annað og fíggjarliga støðan hjá landskassanum setir eitt givið mark fyri atgerðarmøguleikunum, og meirluti er neyvan fyri at flyta hetta mark.

Her er sostatt talan um eina meira trupla støðu hjá landsstýrinum, men hetta merkir ikki, at einki ber til. Landsstýrissamgongan má krita skógvarnar og finna ein leist, sum kann bera. Hetta hevur eydnast hjá øðrum stjórnum, so má tað eisini kunna bera til her hjá okkum. Alt bendir á, at politisk ósemja er um hyggjuráðini. Tað er ikki løgið, tí tað, sum er komið út um hesi ráð bendir á sama gamla heilivágin: sparingar og aftur sparingar á fíggjarlógini, eitt nú við at seta almennu lønirnar niður og pilka við almannaøkið. Hetta hjálpir bert eina tíð, ger helst ilt verri og er politiskt vandamikið fyri flokk fíggjarmálaráðharrans. Hugflog, kreativitetur, nýhugsan, dirvi og vitan um alternativar kreppuloysnir tróta í ólukkumát í ráðgevaraumhvørvi landsstýrisins. Tað kenst, sum øll tey tiltøk, sum higartil eru nevnd, eru tikin úr avoldaðum búskaparlærubókum. Fíggjarmálaráðharrin átti at útvegað sær ein búskaparfrøðiligan hugatanga, a think tank, ein fíggjarligan og búskaparfrøðiligan venjiboksara uttan fyri embætisverkið, har hann kundi fingið ein hóp av góðum, visjonerum og kreativum ráðum, hugskotum og íblástri, so vit ikki altíð enda við somu gomlu búskaparligu heimaráðum, sum lítið gagna og sum altíð revsa teir somu samfelagsbólkarnar - løntakarar og pensjonistar.

**Sosialurin**

## Fuglafjørður og kommunusamanlegging



**KRISTINA T. LARSEN**
býráðslimur

Hervið vil eg gera greitt, at úttalisið hjá Sigurð Simoensen, borgarstjóra í Fuglafirði, í Degi og Viku týsdagin tann 23. juni 09, og hansara ábending um, at hetta er 5. býráðssetan, ið er ímóti eini kommunusamanlegging, stendur fyri hansara rokning. Eg vil við hesum gera greitt, at hansara áskoðan ikki er áskoðanin hjá okkum øllum.

Sum býráðslimur, forkvinna í Mentamálanevndini og limur í Fíggjarnevndini hjá Fuglafjarðar Býráð, vil eg, enn einaferð gera vart við, at eg persónliga eri fyri eini kommunusamanlegging við grannakommununa.

Fuglafjørður, Gøta og Leirvík liggja so tætt, at tað er eins skjótt at koma úr Fuglafirði til Leirvíkar, sum tað eitt nú er at koma frá Hoyvík og oman í miðbýin í Tórshavn.

Leirvík, Gøta og Fuglafjørður hava í langa tíð havt fleiri felags karmar, eitt nú felags ítróttarhøll og felags framhaldsskúla, har hvør borgari í Fuglafjarðar kommunu, yngri enn 59 ár, hevur gingið í skúla saman við borgarum úr ávikavist Leirvík og Gøtu. Somuleiðis sum at ymisk frítíðarítriv hava verið felags. Hetta er eftir míni áskoðan, ein náttúrlig orsøk til samanlegging. Umframt at vit við eini samanlegging, styrkja um møguleikar at fremja eina miðsavning uttan fyri høvusstaðin. Møguleika fyri at miðsavna havnaøkið, størri part av fólkaskúlanum, hugsi serliga um at fáa betri skúlatilboð, eina betri tænastu fyri børn við serligum tørvi, betri viðurskiftum á eldraøkinum og annars eisini, skipa almennar tænastur, so sum læknaog tannlæknatænastur í størri eindir.

Eg haldi meg minnast, at listi D til seinasta val vísti á, at tey vóru fyri eini kommunusamanlegging og listi K vísti somuleiðis á teirra áskoðan, her sitera:

*»vit eiga ikki at sita hendur í favn og verða ímóti eini samanlegging, tí so er vandi fyri at enda sum minsta kommuna í landinum«.*

Hinvegin vísti kvinnulistin somuleiðis á:

*»at vit heldur ikki eiga at leggja saman, bara fyri at leggja saman«. Og tí ynskti kvinnulistin, »at spurningurin um kommunusamanlegging verður umrøddur væl og opið. Umrøðan skal snúgva seg um fyrimunir og vansar í einari samanlegging, og eitt hugskot hjá kvinnulistanum var, at skapa ein pall, har vanligi borgarin hevur høvi at luttaka í skrift og talu«.*

Avbjóðingin er at skapa henda pall, og tað hevði verið gevandi, um stigtakarar í býnum skipaðu fyri t. d. einum tjakpalli, har borgarnir fáa høvi at koma til orðanna. Mín vón er, at vit fáa skapt henda pall skjótt, so lív kann koma í hetta so týðandi tjakið um kommunusamanlegging.

**“Tala og tig ikki”!**

Við borgarakvøðu.

## Størsta skommin er ikki at viðurkenna sínar feilir



**ANN HOVLAND**
sjúkrasystir

Jóannes Eidesgaard heldur tað vera at bíta høvdið av allari skomm at biðja danir um at hækka blokkin aftur. Er tað ikki størri skomm ikki at vilja viðurkenna, at tað var eitt mistak av teim stóru, at blokkurin bleiv skorin í óðum verkum við tí fylgju, at skorið bleiv inn at beini alla staðir í føroyska samfelagnum, og at hetta serliga gekk út yvir okkara veiku, sjúku og gomlu?

Í Sosialinum verður Jóannes Eidesgaard siteraður fyri at siga tað vera mannminkandi og at bíta høvdið av allari skomm, um vit biðja danir um aftur at hækka blokkin, nú føroyska samfelagið er í sváirari kreppu.

**Niðurlagdar deildir og ikki ráð til medisin**

Blokkniðurskurðurin hevur kostað serliga okkara veiku, sjúku og gomlu sera dýrt. Sjúkrahúsverkið t.d. hevur verið noytt at minka so nógv um sína játtan, at tað ein yvirgang ikki vóru pengar til medisin! Og nógvar aðrar sparingar blivu framdar, t.d. var uppvenjingardeildin E3 fyri apoplexirakt niðurløgd. Henda deildin var alneyðug, um ein blóðtøpsraktur skal kunna koma fyri seg aftur.

Men Jóannes heldur eftir øllum at døma, at tað er størri skomm at biðja danir um at hækka blokkin aftur, enn at okkara veiku, sjúku og gomlu verða meiri og minni slept upp á fjall!

**Brótið upp um armar**

Jóannes, tú hevur áður víst teg sum ein veruliga mann, lat ikki fáfongdina fáa valdið á tær og Javnaðarflokkinum, men brótið upp um armar og verið saman við Sambandsflokkinum við til at rætta føroysku samfelagsskútuna uppaftur. Tað vóru hóast alt ikki tit, sum atkvøddu fyri skemdaruppskotinum at minka blokkin.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.